Nr. 36 /2020

Ingilín Didriksen Strøm
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um MVG endurrindan og støðuna hjá smærri vinnurekandi, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Veit landsstýrismaðurin, um smáar fyritøkur, ið søktu um at útseta MVG, fáa trupulleikar við at rinda til freistina 15. november 2020?
2. Er ætlanin at gera eina serskipan fyri endurrindan fyri tær smærru fyritøkurnar, ið ikki kunnu rinda MVG í november, so tað ikki fær lemjandi avleiðingar fyri hesar fyritøkurnar?
3. Hevur landsstýrismaðurin nakra vitan um, hvussu støðan er hjá teimum smærri vinnurekandi sum heild?
4. Er ætlanin at seta í verk fleiri hjálparátøk fyri smærri fyritøkur, ið uppliva langtíðarfylgjur av støðuni við COVID-19?

Viðmerkingar:
Fyrr í ár veitti Hjálparpakki 1 frá Føroya landsstýri neyðuga hjálp til arbeiðsfólk og vinnur í Føroyum, ið vóru rakt av COVID-19. Millum annað valdi mann at útseta avrokning fyri MVG. Hetta var sambært landsstýrinum fyri at styrkja gjaldførið hjá fyritøkum. Sostatt varð innlating og avrokning fyri MVG fyri 1. ársfjórðing útsett til 15. november 2020, og sostatt nærkast vit nú hesi útsettu freistini.
Eingin ivi er um, at COVID-19 hevur rakt okkum meint og leingi. Hugsast kann, at nógvar smærri fyritøkur, ið hava útsett, framvegis eru ógvuliga sperdar, kanska serliga nú vit eru í lágárstíð. Harafturat vita vit ikki, um ein bylgja av nýggjum tilburðum, eins og aðrastaðni í heiminum, eisini kemur til Føroya í vetur, og sostatt merkir, at vinnan aftur missir inntøkugrundarlagið.
Størru fyritøkurnar fara helst at klára seg, men spurningurin er, um tað kann vera neyðugt við eini serskipan til tær smáu fyritøkurnar, sum ikki hava sama gjaldføri. Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 30. oktobur 2020

Ingilín Didriksen Strøm